FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Meeting of the Board of Directors

| | |
|---|---|
| **Date** | November 24, 2020 |
| **Time** | 3 hours (9:00-12:00) – but actually ended at 12.30 |
| **Place** | Online Zoom |
| **Participating** | Ólavur Ellefsen, Chair of the Board<br>Marita Rasmussen, Vice-Chair of the Board<br>Anders Bjarklev, Board member<br>Guðrún Nordal, Board Member<br>Sára Joensen, Board Member<br>Svein-Ole Mikalsen, Board Member<br>Magnus Steinsson við Streym, Student Board Member<br>Martin Zachariasen, Deputy Board Member<br>Heidi Poulsen, Deputy Board Member<br>Vár í Ólavsstovu, Deputy Board member<br>Chik Collins, Rector<br>Johan Hansen, University Director<br><br>Participated under item 4:<br>Hugin Skaalum, Head of Finance<br><br>Participated under item 6c:<br>Rannvá Dávadóttir, Head of Student Services<br><br>Board Members unable to attend:<br>Oda Kjartansdóttir Strøm, Student Deputy Board Member (replacing Durith í Homrum)<br>Annika Smith, Deputy Board member<br>Hans Pauli Strøm, Deputy Board member<br>Hans Harryson, Deputy Board member |
| **Keeper of the minutes** | Súsanna Jógvansdóttir Golan |

***See Faroese version of minutes on page 7.**

*Purpose of the meeting: To report and discuss recent developments and to have focused discussion regarding progress against some key aspects of the Strategic Plan, 2020-2024*

1. *Chair's welcome*
2. *Approval of Agenda (Paper 1)*
3. *Approval of minutes from 20th August 2020 (Paper 2)*
4. *Finance Report and Budget Planning for 2021– from Head of Finance (Papers 3 and 4)*
5. *Rector's Report (Paper 5)*
6. *Discussion Items: Progress on key aspects of the Strategic Plan, 2020-2024.*

    a. *Chair's report on Strategic Campus Plan Discussions with the Ministry (Paper 6)*
    b. *Proposed updating of Regulations Governing Positions at the University of the Faroe Islands (Papers in Folder 7)*
    c. *Initiative on Student Retention and Progression: Presentation of Data from the Head of Student Services (Paper 8)*
    d. *Freedom of Research in the light of the Standard Procedure for External Research bids (Paper 9)*
    e. *Possible university policy on parental leave and long-term sick leave*

7. *Discussion: Reflections from Board members at the end of the period of service of the current Board.*
8. *Chair's concluding remarks*

## 1. Chair's welcome

The chair welcomed members to the last meeting of the current board.

## 2. Approval of Agenda (Paper 1)

The chair informed that item 6e will be discussed under item 4 (financial matters). Following that the agenda was approved.

## 3. Approval of minutes from 20th August 2020 (Paper 2)

The minutes from the meeting of 20th August were approved without amendment.

## 4. Finance Report and Budget Planning for 2021– from Head of Finance (Papers 3 and 4)

The Head of Finance went over the status of the current situation. There is a deficit for this quarter while however there has been surplus from the preceding part of the year. The Head of Finance and the Rector are having regular meetings with the Deans and Director to ensure that all expenses come in before the year is over. For now, there is a surplus. The main reasons for surplus are connected to covid-19. Less has been spent on salaries as hiring of positions was delayed due to lock-down earlier this year. Less has also been spent on practicum of students in mainly nursing, teaching and the pedagogue courses, also due to covid-19. There has also been less expenses on external teachers. The costs for tools in relation to replacing onsite teaching to online teaching have been relatively cheaper than some solutions apparently used at other universities. It has been considered investing in a studio for online teaching, which would require some higher investments. That however has not been done yet. On the other hand, we have increased spending on GDPR related preparations.

The proposed grant for 2021 is lower than we originally asked for and therefore some revisions to the original projected budget have been required. The current adjustments made to the projected budget for 2021 go from a deficit of 3 million to about a deficit of 50.000 DKK, which is much closer to the expected grant. One member highlighted that IT sources are too low for 2021 as IT support is needed. There was an agreement to the point and was said that it will be prioritised as far as possible.

Item 6e was then discussed. A board member had raised the topic regarding Ph.D. students that go on leave, mainly maternity leave, and asked whether it would be possible to establish a system where the finances of such a leave would be covered by the general finance law rather than the Ph.D. grant itself which does not stretch to cover leaves. Moreover, it was proposed to a greater degree automatically getting substitutes hired earlier when someone goes on maternity leave. The Rector highlighted that this is not an area where we in fact face major challenges, and he indicated that he did not feel it was something which was at a level that required Board discussion or that should be prioritised for the Board given the many other important items for discussion. The government will unlikely be willing to change financial regulations. He stressed the need to have an overhead in Ph.D. grants that would help to cover such a leave and for the University more generally to have a buffer to assist where required. Regarding the question of having a regular practice of hiring substitutes before the person goes on leave, it was highlighted that currently

three university staff are going on leave and all substitutes have been hired a month before the leave starts. It was argued that deans should retain the entitlement to make decisions to deal with leaves, rather than it coming from higher levels.

The board members then approved the outline budget for 2021.

## 5. Rector's Report (Paper 5)

The rector summarised his rector's report, which was shared with members ahead of the meeting. Following that there were some questions and discussion.

It was asked whether covid-19 had increased numbers of applications, which it has e.g. in Iceland. Here there was some increase of numbers for admission 2020/2021, but we do not know yet for next year.

Several universities have been greatly challenged by cyber-attacks during covid-19. It was asked whether the university has been affected by that and advised to be pro-active in countering possible attacks by seeking collaboration with experts on preventative matters.

The policy on sexism and sexual harassment is in the making and it was asked why now and whether it applies to students as well. The rector informed that it came in light of the recent debate and events in Denmark and that the student services are working on a similar document to go out to students prior to Christmas. He further informed that students are always welcome to contact the leadership and him directly, if there are any concerns. Anonymity will be respected. It was discussed how the other universities are handling such cases. It was emphasized that it is important to have different options to where to raise your concerns in order for the system to work and be trusted. Different 'safe' routes are necessary.

It was asked where we are in the process of renewing the executive order which was delayed due to external factors earlier this year. We need to focus and push the Ministry for it to happen before the next graduations. The student union was encouraged to push for that as well at the Ministry.

Finally, it was asked whether there are any considerations to discuss separating the teacher's education from the university as has been promoted by some in the media on various occasions. The Rector clarified that the Ministry has stated that there are no considerations to separate the teacher program from the university and the discussion will not be taken forward. The university holds the same view. He also indicated that as a result of discussions he has had with various parties, the argument for separation seems to have reduced significantly.

## 6. Discussion Items: Progress on key aspects of the Strategic Plan, 2020-2024.

### a. *Chair's report on Strategic Campus Plan Discussions with the Ministry (Paper 6)*

The chair presented the ideas on the campus plan that the board has recently proposed in meeting with the Ministry. The main idea is that instead of demolishing the building on Frælsið (gamli Læraraskúlin) we would rather start to renovate one section (lon) after the other. That idea was more liked than using containers as temporary solutions waiting for the complete campus. The key is to refurbish rather than demolish and at the same time

initiate the campus plan, starting with the central building and the parking lot and ultimately bringing all the faculties together in a closer area. The Minister had been very positive about the idea and supports initiating it.

Skúlin á Fløtum has moved out of their sections and the Ministry is supporting the university moving in. However, some discussion with the municipality still needs to be settled before that can happen.

In conclusion the recent ideas proposed to the Ministry have been received well and the rest of the board supported the ideas proposed.

b. *Proposed updating of Regulations Governing Positions at the University of the Faroe Islands (Papers in Folder 7)*

The rector presented the updated document with the proposed changes. It has been updated to reflect the changes at the University since 2016. Other than that, there are no major changes to the existing descriptions, but rather they have been brought together and explained better and some gaps have been filled.

There were some comments from one Board member on aspects of detail, and the rector asked for those to be sent in an email. He stressed that the comments were relevant to long-standing job descriptions, rather than anything which had been updated or was proposed for change.

The rector proposed to the board to allow minor changes in the document without approval of the board to allow for continuing development to take place in the coming months. Members were wary of approving that, while acknowledging that bringing minor changes to the board for approval every time will unnecessarily make the process more inefficient and slower than necessary or helpful. It was suggested splitting the document in two, so that one less detailed version would go to the board for approval while a detailed version could be changed internally. The rector stressed that the current document is seriously out of date and does not provide a satisfactory basis for our current activities. The rector and the chair of the board will discuss further solutions, including having regular updates reported to the Board and discussed as is felt necessary.

c. *Initiative on Student Retention and Progression: Presentation of Data from the Head of Student Services (Paper 8)*

The Head of Student Services present the data on student retention and progression that they have produced since August, which was provided in the papers for the Board.

Dropout rates vary from faculty to faculty. The numbers for dropout seem to indicate that overall, we are doing relatively well compared to Danish statistics, while not so good compared to UK statistics. Many of our students take leaves, mainly maternity leaves, but that does not count for slower progression for completing in time. Bachelor programs are doing relatively better than master programs, where completion is slow. The success rates however vary much from program to program, also in the

bachelor's level, where the nurse, pedagogue and teacher's program are doing best – the programs that were merged to the university.

We need to look further into why the statistics differ so much from program to program. The programs of the newer part of the university (nurse, pedagogue and teacher's program) have standard practicum and mandatory attendance unlike the other programs. Further investigation on correlations to completion on time needs to be assessed. Only 42% of the students in the master program receive the monthly grant from Studni. That indicates that the majority is working up to full time while being on fulltime studies. We need to rethink if it is suitable to work while on a master's program or rethink the design of our programs. We need to look into how significantly drop out is connected to when students are admitted to programs that were their second or third choice. Furthermore, we need to examine how the distance students have to the university, accommodation and mental health affects the completion/dropout rates of our students.

The rector concluded that we need to have a higher portion of students completing their studies and acknowledge the figures and work towards improving them.

d. *Freedom of Research in the light of the Standard Procedure for External Research bids (Paper 9)*

A board member made the case that the recently agreed procedure for the development and approval of external research bids, involving peer review, could amount to an infringement of academic freedom. This was reported as the view of some staff in one Faculty. After a lengthy discussion, the overwhelming view of the Board was that such procedures are in fact a standard and important aspect of the research process in modern, professional universities, and that they do not at all challenge academic freedom.

It was stressed that the new procedure is an updating of an existing procedure, but one which is not well constructed and is poorly implemented. As a result, the Research Council has previously commented that some applications that have been sent to them have not been good enough for external reviews in the first place (as reported by overseas reviewers), which harms the reputation of the university. Moreover, some aspects of control are necessary e.g. financial aspects so that we manage projects properly and do not end up with substantial deficits as has been the case with several previous projects.

Nevertheless, it was stated that there has been no intention whatsoever to infringe freedom of research with the recently established procedures and anyone who has concerns about that actually ever happening would of course be at liberty to raise the issue. It was stressed by the Rector that peer review is in fact a basic principle of academic life and that it needs to be part of the internal life of our University if we are to live up to international standards of academic life. He thought it a matter of concern that senior researchers in one of our faculties seemed to have a belief in

some kind of principled opposition to what is in fact a fundamental principle of academic life. He thought that was misguided and bad for the faculty and the University.

e. *Possible university policy on parental leave and long-term sick leave*
Discussed under item 4. No further discussion here.

7. *Discussion: Reflections from Board members at the end of the period of service of the current Board.*

Members thanked for the cooperation for the last 4 years and pointed out that the university has moved a lot forward for the last years, especially the last year or so. The chair of the board will send a survey to members for review of the last 4 years.

8. *Chair's concluding remarks*

Finally, the chair of the board thanked for the last 4 years with the board and stated that the university has moved in the right direction where the modernisation of the organisation started with the previous rector has continued to move forward with the current rector, being thankful for that. The chair and the rector will follow up on item 6b before the new board comes in January 1, 2021.

**The meeting ended at 12:30.**

---

**Sí føroyska útgávu av fundarfrásøgnini niðanfyri ↓**

---

*Endamálið við fundinum: At greiða stýrinum frá gongdini í seinastuni og umrøða framstigini í nøkrum av høvuðsmálunum í strategiætlanini 2020-2024*

1. *Stýrisformaðurin bjóðar vælkomin*
2. *Góðkenning av skrá (skjal 1)*
3. *Góðkenning av fundarfrásøgn frá 20. august 2020 (skjal 2)*
4. *Fíggjarfrágreiðing og fíggjarætlan fyri 2021 – frá fíggjarleiðaranum (skjal 3 og 4)*
5. *Frágreiðingin frá rektaranum – (skjal 5)*
6. *Umrøða av gongdini í nøkrum av høvuðsmálunum í strategiætlanini 2020-2024*
    a. *Frágreiðing frá stýrisformanninum um samskifti við Mentamálaráðið um kampusætlanina (skjal 6)*
    b. *Uppskot til dagføring av skjalinum 'Reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya' (skjal 7)*
    c. *Tiltøk í samband við at halda lesandi til og í framgongd: lestrarskrivstovuleiðarin leggur hagtøl fram (skjal 8)*
    d. *Granskingarfrælsi og mannagongd fyri 'Fráboðan, fyrireiking og góðkenning av umsóknum um granskingarstuðul' (skjal 9)*
    e. *Møguligur politikkur fyri barnsburðarfarloyvi og langtíðar sjúkrafarloyvi*
7. *Orðaskifti: Stýrislimirnir líta aftur á arbeiðið í stýrinum seinastu 4 árini*
8. *Stýrisformaðurin tekur samanum*

---

1. *Stýrisformaðurin bjóðar vælkomin*
   Stýrisformaðurin bjóðaði limunum vælkomnum til seinasta fundin við verandi stýri.

2. *Góðkenning av skrá (skjal 1)*
   Stýrisformaðurin kunnaði um, at punkt 6e á skránni verður viðgjørt undir punkti 4 (fíggjarviðurskifti). Síðani var skráin góðkend.

3. *Góðkenning av fundarfrásøgn frá 20. august 2020 (skjal 2)*
   Fundarfrágreiðingin frá seinasta fundi 20. august 2020 var góðkend uttan broytingar.

4. *Fíggjarfrágreiðing og fíggjarætlan fyri 2021 – frá fíggjarleiðaranum (skjal 3 og 4)*
   Fíggjarleiðarin gjøgnumgekk tølini fyri árið. Hendan ársfjórðingin er undirskot, hinir ársfjórðingarnir vísa yvirskot. Fíggjarleiðarin og rektarin fundast regluliga við dekanarnar og fyrisitingarstjóran fyri at tryggja, at allar rokningar fyri árið verða skrásettar, áðrenn árið er úti. Sum støðan er nú, er yvirskot, og er høvuðsorsøkin covid-19. Lønarkostnaðirnir hava verið lægri enn væntað var, av tí at starvssetanir vóru útsettar, tá samfelagið stongdi fyrr í ár, og starvsfólk vóru send heim at arbeiða. Somuleiðis hava kostnaðirnir fyri starsvenjingar og leysalærarar verið lægri av somu orsøk. Kostnaður til útgerð í samband við undirvísing á netinum hevur verið lutfalsliga bíligari enn møguligar aðrar loysnir brúktar á øðrum universitetum. Umhugsað hevur verið at gjørt eitt studio til netundirvísing, sum hevði kravt eina hægri íløgu. Tó er hetta ikki komið í lag enn. Hinvegin hava fyrireikingar í sambandi við herdu dátuverndarlógina kravt hægri útreiðslur.
   
   Fíggjarlógaruppskotið fyri 2021 er lægri enn tað, sum Setrið upprunaliga bað um, og tí hevur verið neyðugt at endurskoða upprunaligu fíggjarætlanina, sum nú er tillagað frá halli á 3 milliónir til hall á 50.000 kr., har nærkast verður fíggjarlógaruppskotinum. Ein av viðmerkingunum frá einum av stýrislimunum var, at ætlaða íløgan á KT-økinum í 2021 var lág, og dentur varð lagdur á tørvin á KT-support. Hendan áheitanin var viðurkend, og sagt varð, at hetta verður raðfest so frammarlaga sum gjørligt.
   
   Punkt 6e á skránni var síðani umrøtt. Orðaskiftið var um farloyvi, í høvuðsheitinum barnsburðarfarloyvi, og ph.d.-lestur. Ein stýrislimur skeyt upp at endurskoða skipanina soleiðis, at fíggingin av farloyvum verður fevnd av játtanini heldur enn av ph.d.-verkætlanini, sum ikki umfatar fígging til farloyvi. Ført var fram, at størvini eiga at vera sett fyrr, tá starvsfólk fer í barnsburðarfarloyvi. Rektarin legði dent á, at hetta ikki er eitt øki, sum vit hava stórvegis trupulleikar við, og førdi somuleiðis fram, at honum tykti hetta kjak ikki at vera eitt mál hjá stýrinum at umrøða, heldur eigur tað at verða umrøtt á lægri stigi, tí Stýrið hevur onnur meiri átrokandi mál at taka upp. Harumframt er politiska skipanin neyvan opin fyri at broyta ásetingarnar hesum viðvíkjandi. Umráðandi er tískil at hava rakstrargjald (overhead) íroknað í ph.d.-játtanirnar, soleiðis at rúmd fyri farloyvum er í fíggjarætlanini fyri verkætlanirnar, og at stovnurin hevur sett fígging av til slíkar støður. Viðvíkjandi spurninginum um at seta fólk í farloyvisstarv, áðrenn starvsfólkið sjálvt fer í farloyvi, varð nevnt, at í verandi løtu eru trý slík farloyvisstarv sett, ein mánað áðrenn farloyvið byrjaði.

Ført varð fram, at avgerðarrætturin skal liggja hjá dekanunum, hvussu hetta verður skipað á deildarstigi.

Síðani varð fíggjarætlanin fyri 2021 góðkend av stýrinum.

5. *Frágreiðingin frá rektaranum – (skjal 5)*
Rektarin tók samanum frágreiðingina, sum var send limunum áðrenn fundin. Síðani vóru spurningar og orðaskifti.

Spurt varð, um covid-19 hevur ført til hækking av umsóknum, sum tað hevur í eitt nú Íslandi. Svarað varð, at talið fyri 2020/2021 var hækkað nakað, men vit vita ikki enn, hvussu hetta fer at ávirka talið á umsóknum fyri 2021/2022.

Telduálop hava verið á fleiri universitet í koronatíðini. Spurt varð, um Setrið eisini hevur verið úti fyri tí sama, meðan tað eisini var rátt til, at Setrið fyrireikar seg ímóti slíkum álopum og søkir sær fyribyrgjandi ráð frá serkønum.

Politikkurin um ágang (nú kallaður 'leiðreglur fyri niðrandi atburð') er í gerð, og spurt varð um, hví hetta tekur seg upp nú, og um hetta eisini fer at vera galdandi fyri lesandi. Stig er tikið til at fáa leiðreglurnar í lag eftir tilburðirnar og orðaskiftið um ágangandi atburð í Danmark seinastu tíðina av valdmiklum fólki. Lestrarskrivstovan arbeiðir við líknandi leiðreglum til lesandi. Rektarin legði dent á, at lesandi altíð eru vælkomin at seta seg í samband við leiðsluna, og eisini við hann beinleiðis, í trúnaði. Víst varð á, hvussu onnur universitet hava handfarið tílík mál, har dentur varð lagdur á, at umráðandi er, at ein, sum er úti fyri ágangi, hevur fleiri støð at venda sær til fyri at leggja sína sak fram, soleiðis at hetta verður viðgjørt, har ein kennir seg mest tryggan. Hetta fyri at tryggja álit á skipanina.

Spurt varð um arbeiðið við nýggju kunngerðini, sum Uttanríkis- og mentamálaráðið (UMMR) avgjørdi fyribils at steðga íverksetanina av fyrr í ár. Umráðandi er nú, at UMMR fær kunngerðina lidna áðrenn næstu prógvhandanirnar, har vit gera okkara til, at hetta kemur í lag. Ráð teirra lesandi vil eisini eggja til, at hetta kemur í lag.

Umsíðir varð spurt, um Setrið er opið fyri at fara í orðaskifti um at skilja læraraútbúgvingina frá Setrinum, sum summar røddir hava stuðlað undir í miðlunum. Rektarin gjørdi greitt, at UMMR hevur staðfest, at tað eru ongar ætlanir um at skilja læraraútbúgvingina frá Fróðskaparsetrinum, og at málið verður ikki tikið víðari. Fróðskaparsetrið er av somu áskoðan. Rektarin nevndi eisini, at eftir umrøðu av málinum við fleiri partar, er hugurin til sundurbýti minkaður munandi.

6. *Umrøða av gongdini í nøkrum av høvuðsmálunum í strategiætlanini 2020-2024*
    a. *Frágreiðing frá stýrisformanninum um samskifti við Mentamálaráðið um kampusætlanina (skjal 6)*
    Stýrisformaðurin legði fram kampusætlanina, sum nýliga er løgd fram fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið. Viðvíkjandi gamla læraraskúlanum á Frælsinum er høvuðstankin at umvæla lon fyri lon, heldur enn at bróta niður og byggja uppaftur. Størri undirtøka er fyri hesi loysnini enn at flyta virksemið í bingjur á Frælsinum, inntil eitt nýtt kampus er klárt. Ætlanin umfatar at umvæla, samstundis sum kampusøkið verður víðkað og virksemið verður knýtt í bygningar tættari hvørjum øðrum. Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum stuðlar hesum.

Skúlin á Fløtum er nú fluttur úr lonunum á Frælsinum. UMMR stuðlar okkum í at flyta okkara virksemi í lonirnar, sum nú eru tøkar. Tó mugu vit fyrst finna eina semju við kommununa hesum viðvíkjandi.

Umrøðan av ætlanini hevur verið væl móttikin av UMMR, og restin av stýrinum tók eisini undir við framløgdu ætlan.

b. *Uppskot til dagføring av skjalinum 'Reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya' (skjal 7)*
Rektarin legði dagførda skjalið um reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetrið Føroya fram. Dagføringarnar endurspegla broytingarnar síðani 2016. Skjalið útgreinar innihaldið nærri, og nakað er lagt afturat, har frágreiðing vantaði. Annars eru ongar stórvegis broytingar til innihaldið sjálvt.

Nakrar viðmerkingar vóru til eina punktið, sum eisini stóð í gomlu útgávuni. Rektarin bað viðkomandi um at senda viðmerkingarnar í telduposti, sum ikki snúðu seg um dagførda innihaldið við nýggju starvslýsingunum, men til gamla partin av skjalinum.

Rektarin skeyt upp, at loyvi verður givið rektaranum at gera smærri broytingar í skjalinum uttan góðkenning frá stýrinum, soleiðis at arbeiðið við skjalinum verður meir ómakaleyst komandi mánaðirnar. Limirnir hildu seg aftur við at góðkenna tað, men viðurkendu tó, at tað verður ov umfatandi og rúgvumikið at leggja allar smærri broytingar fram fyri stýrið til góðkenningar, hvørja ferð tørvur er á tí. Tískil varð skotið upp at deila skjalið upp við einari styttri meir generellari útgávu, sum skal leggjast fram fyri stýrið, tá broytingar eru í uppskoti, umframt eina aðra meir nágreiniligari útgávu, sum kann broytast innanhýsis uttan góðkenning frá stýrinum. Rektarin legði dent á, at núverandi skjal samsvarar ikki við verandi virksemi á Fróðskaparsetrinum, og rektarin og stýrisformaðurin  fara sostatt at viðgera neyðugu broytingarnar víðari, og vilja upplýsa stýrið um dagføringarnar leypandi, og taka stýrið við upp í viðgerð, tá hóskandi er.

c. *Tiltøk í samband við at halda lesandi til og í framgongd: lestrarskrivstovuleiðarin leggur hagtøl fram (skjal 8)*
Lestrarskrivstovuleiðarin helt framløgu við hagtølum um framgongd og fráfall hjá okkara lesandi. Hagtølini (skjal 8) vóru eisini send stýrislimunum áðrenn fundin.

Fráfallið er ymiskt frá deild til deild. Yvirskipað síggja hagtølini gott út samanborið við donsk hagtøl, meðan verri er, tá samanborið verður við bretskt hagtøl. Fleiri av okkara lesandi taka farloyvi í lestrinum, í høvuðsheitum barnsburðarfarloyvi. Hetta ávirkar tó ikki hagtølini fyri framgongd, tá barnsburðarloyvi ikki telur við sum seinking í framgongd. Hagtølini síggja betur út á bachelorútbúgvingunum samanborið við masterútbúgvingarnar, har lesandi taka longri tíð um at gerast liðug við útbúgvingina. Framgongdin er tó sera ymisk frá útbúgving til útbúgving, eisini tá tað kemur til bachelorútbúgvingarnar, har sjúkrarøkt, námsfrøði og læraraútbúgvingin standa seg best – hetta eru útbúgvingarnar, sum vóru lagdar saman við Setrið í 2008.

Nú krevst, at hugt verður nærri eftir, hví hagtølini eru so ymisk frá deild til deild. Sjúkrarøkt, námsfrøði og læraraútbúgvingarnar hava

starvslæru sum kravdan part av útbúgvingini, og eisini er møtiskylda. Kannast skal nærri, um samband er millum hetta og at gera útbúgvingina lidna til tíðina. Bara 42% av lesandi á masterútbúgvingunum fáa mánaðarligan studning frá Studna. Hetta bendir á, at flest helst arbeiða upp til fulla tíð, samstundis sum tey eru innskrivað til fulltíðarlestur. Vit mugu endurskoða, um tað hóskar seg at arbeiða fulla tíð, meðan ein er innskrivaður til masterlestur, ella mugu vit umskipa masterútbúgvingarnar. Harafturat skal hyggjast nærri at, um tølini fyri fráfalli eru hægri í teimum førum, tá lesandi komu inn á útbúgvingina sum teirra annað ella triðja ynski samanborið við har, sum lesandi sluppu inn á útbúgvingina, sum var teirra fyrsta ynski. Umsíðir skal eisini nærri hyggjast eftir, hvat fyri leiklut sálarlig heilsa, bústaðarviðurskifti og frástøða til høvuðsstaðin, hava upp á hagtølini fyri fráfall og framgongd.

Rektarin dró saman um og viðurkendi, at meir arbeiði skal leggjast í at halda lesandi til, soleiðis at hagtølini betrast.

d. *Granskingarfrælsi og mannagongd fyri 'Fráboðan, fyrireiking og góðkenning av umsóknum um granskingarstuðul' (skjal 9)*
Ein stýrislimur bar fram, at nýggja samtykta mannagongdin fyri '*Fráboðan, fyrireiking og góðkenning av umsóknum um granskingarstuðul'* kundi verðið skilt sum brot á granskingarfrælsi. Hetta var áskoðanin hjá ávísum starvsfólki á einari deild. Eftir longri kjak var greitt, av meginparturin av stýrinum tók undir við, at ein slík mannagongd er ein vanligur og neyðugur partur av granskingarframgongdini á einum nýmótans professionellum universiteti, og at hetta ikki er ein hóttan av granskingarfrælsinum.

Dentur varð lagdur á, at hendan mannagongdin er ein dagføring av eini verandi mannagongd, sum tó var ógreið og ongantíð veruliga framd í verki. Av teirri orsøk hevur Granskingarráðið eisini fyrr viðmerkt, at summar umsóknir, sum eru sendar teimum frá okkum, hava ikki verið á nøktandi stigi at senda til uttanhýsis javnlíkameting (sum viðmerkt hevur verið av uttanhýsis ummælarum), og hetta kann skaða umdømið hjá Fróðskaparsetrinum. Harafturat er neyðugt við onkrum slagi av eftirliti, m.a. fyri at tryggja, at verkætlanir verða fyriskipaðar skynsamt, og at undirskot ikki kemur fyri, sum hevur verið støðan við fleiri undanfarnum verkætlanum.

Staðfest varð tó, at tað eru ongar ætlanir yvirhøvur um at skerja granskingarfrælsið við íverksetan av hesi nýliga samtyktu mannagongd, og um nakar hevur illgruna um, at tað nakrantíð er hent, skal ein sjálvandi føla seg frían til at bera tað fram. Rektarin legði dent á, at javnlíkameting er ein grundregla í akademiska umhvørvinum, og at hetta eigur eisini at gerast partur av okkara innanhýsis hugburði á Setrinum, um vit skulu liva upp til altjóða granskingarkrøv. Hann var stúrin um, at ávísir granskarar á eini deild eru av tí áskoðan, at nakað, sum annars er vanligur hugburður í akademiska umhvørvinum, er brot á granskingarfrælsið. Rektarin helt, at tað var misvísandi og óheppið fyri deildina og Setrið.

e. *Møguligur politikkur fyri barnsburðarfarloyvi og langtíðar sjúkrafarloyvi*
Hetta varð viðgjørt undir punkti 4 á skránni. Onki varð lagt afturat her.

7. *Orðaskifti: Stýrislimirnir líta aftur á arbeiðið í stýrinum seinastu 4 árini*
   Stýrislimirnir takkaðu fyri samstarvið seinastu 4 árini í stýrinum og bóru fram, at stovnurin hevur ment seg nógv seinastu árini, serliga tað síðsta árið. Stýrisformaðurin fer at senda eitt eftirmetingarskjal til limirnar at fylla út fyri seinastu 4 árini.

8. *Stýrisformaðurin tekur samanum*
   At enda takkaði stýrisformaðurin stýrinum fyri arbeiðið seinastu 4 árini og staðfesti, at Fróðskaparsetrið hevur sett kós rætta vegin, har nútímansgerð av stovninum byrjaði við undanfarna rektara og er hildin fram við verandi rektara. Stýrisformaðurin og rektarin fylgja upp viðvíkjandi punkti 6b á skránni, áðrenn nýggja stýrið tekur við 1. januar 2021.

**Fundurin endaði kl. 12:30**